Útrokningar vegna Føroyskir fiskimenn uttanlands (FFU)

Grundað á skattligu avleiðingar, sum broytingar í føroysku skattalógini hava viðført hjá FFU, hevur felagið umbiðið útrokningar, sum visa hvør teirra støðu er ímun til aðrar tilsvarandi starvsbólkar.

Grundarlagið í útrokningunum er:

- Veiðuinntøka á 750.000 DKK
- Fiskimanna- og samdøgufrádráttur sum hevur fingið fullan virkna í 2026
- Landsskattur og almenn gjøld, sum tey eru pr dags dato
- Kommunuskattur á 20% við einum botnfrádráttir á 30.000
- Kirkjuskattur á 0,60%

Við hesum fortreytum er skatturin hjá ávikavist fiskimanni í føroyum, fiskimanni í Norra og einum sum arbeiður í frálandavinnuni í Norra. Niðanfyri er talvur, sum vísa skattskylduga inntøkuna, skattur og effektivt skattatrýst:

Fiskimaður í NO			
Veiðuinntøka	0,00	0%	750.000,00
Fiskimannafrádráttur	-300.000,00	14%	-42.000,00
Samdøgursfrádráttur	-120,00	150,00	-18.000,00
Eftirløn	0,00	0,00	0,00
Skattskyldug inntøka			**690.000,00**
Skattur tilsamans			**342.165,00**
Effektivt skattatrýst			**45,62%**

Fiskimaður í FO			
Veiðuinntøka	0,00	0%	750.000,00
Fiskimannafrádráttur	-300.000,00	14%	-42.000,00
Samdøgursfrádráttur	-120,00	0,00	0,00
Eftirløn	0,00	12%	-90.000,00
Skattskyldug inntøka			**618.000,00**
Skattur tilsamans			**308.283,00**
Effektivt skattatrýst			**41,10%**

Frálandavinnan í Norra			
Inntøka			750.000,00
Skattskyldug inntøka			**750.000,00**
Skattur tilsamans			**252.150,00**
Effektivt skattatrýst			**33,62%**

Um fiskimaðurin í Norra verður samanborin við ein í frálandavinnuni í Norra, so er rindar fiskimaðurin í Norra 90.015 kr meira í skatti. Effektiva skattatrýstið í frálandavinnuni í Norra er á 33,62% ímun til fiskimannin í Norra á 45,62%.

Sum útrokningarnar vísa, so rindar ein fiskimaður 33.882 kr meira í skatti ímun til ein fiskimann í Føroyum, tá veiðuinntøku er á 750.000 kr. Effektiva skattatrýstið hjá fiskimanninum er á 45,62% ímun til 41,10% hjá einum fiskimanni í Føroyum.

Hesin munurin økist, um hædd eisini skal takast fyri eftirlønarútgjaldinum. Hetta kemst av, at fiskimaðurin í Føroyum hevur rindað skatt av eftirlønini við inngjald og fær útgjaldið tískil skattafrítt, ímeðan fiskimaðurin í Norra skal rinda skatt av eftirlønarútgjaldinum, hóast hann hevur rindað eftirlønarinngjaldið í Norra við skattaðum pengum.

Harumframt skal vísast á, at fólkapensjónin ger støðuna hjá føroysku fiskimonnum í Norra uppaftur verri ímun til fiskimenn í Føroyum, grundað á at teir rinda til fólkapensjónina í Føroyum umvegs vanliga lønarskattin, men tá teir so fara á eftirløn fáa teir ikki fólkapensjón útgoldna í Føroyum, tí hon verður mótroknað í eftirlønarútgjaldinum, sum teir fáa úr Norra.

Tískil kann staðfestast, at fiskimaðurin í Norra hevur eitt hægri skattatrýst samanborið við fiskimannin í Føroyum, umframt at fiskimaðurin í Norra er verri stillaður, tá ið umræður hansara eftirlønar viðurskiftir.

Norðragøta 23. apríl 2024

Arni Rasmussen

Cand.merc.aud